

*Framgongdin hjá Pál Joensen stendur bara við. Um vikuskiftið fór hann upp um 900 Fina-stig á bæði 800 og 1500 metrum*

# Pál upp um 900 stig

**Sum fyrsti føroyski svimjarin nakran tíð kom Pál Joensen upp um 900 stig á Fina-styrkislistanum. Hetta tá hann í einum høgdi 45 sekund av føroyska metinum á 1.500 metra frísvimjing**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Pál Joensen gjørdi veruliga bart, tá svimjarar hjá Suðuroyar Svimjifelag um vikuskiftið tóku lut í Danish Open í Gladsaxe.

Bæði á 800 og 1.500 metra teininum mest sum skræddi Pál burtur av føroysku metunum á langbana. Ikki færri enn 30 sekund vórðu skorin av metinum á 800 metrum, og á 1500 metrum karvaði vágbingurin 45 sekund av gamla metinum.

Og tað gav eisini úrslit á fina-styrkislistanum. Tað er ikki long tíð síðani, at Elspa Mørkøre og Pál Joensen sum fyrstu føroyingarnir svumu seg upp um 800 stig á hesum listanum, men tann marknaðsteinin hevur Pál nú flutt enn longur.

Lonu leygardagin kom hann upp á 902 stig á 1500 metrunum, og tá hann sunnudagin svam sín besta 800 metur, gjørdist talan um 936 stig á listanum.

Umframt at seta føroysk met á teinunum, var talan so ruddiliga eisini um donsk juniormet. Væl at merkja juniormet, ið eru sett av svimjarum, sum í heyst skulu taka lut í OL.

# Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum.**

»Ta id b36 ik megnar at vinna a okkum her nordi, so vænti eg ik at teir hava nakran møguleika imoti brøndby;-)«

»Eli ma ik hava dunk vi hondina :-) «

»Øll eru hjartalig vælkomim til stordystin nsi-hb komandi torskvøld vid løkin og vonandi geva a tvey god lid okkum askodarum eitt gott fotboltsupplivilsiat fara vid i summarferiu.«

»Gott kempa b71. Tit eru fantastiskir!«

»Dunkur og Eli :-) nej nej, han knalladi dunkin út til àskodarnir«

»Tummas rubeksen.og trondur slgurson abslute ta farligsta àlops makkara parid i fo!«

»Neutralur askodari: hatta var fuletandi skomm at siggja B68 i Gundadali i dag...Luktar av 1. Deild! Var ik imponeradur av HB heldur!«

»Teir ì midverjuni hja b71, voru bara soo godir.«

»Eli a landsliei sum vatnberari :$)«

»Allan Tungà, B71, er føroya besti vinstri bakkur! Lìtli gullbrand rular :)«

»Injector arena? Hvì gera kì meira bygdasligt enn tad er? PS: Rodrigo super, hald hann so leingi titt kunna Djurhuus«

»Her er ein gód ein: Kí eru ósigradir a Injector Arena! «

»**Aheitan á EB/ST taki og blaki stjørnuhamin og taki arbeiðshandskarnar uppáaftur og arbeiði sum eitt lið so koma stigini eisini.**«

